

**Toyota Corolla 1.9 D Linea Terra S/D**

**Skrásetingarnr:** AG 716 **Km:** 101.000
**Árgangur:** 26.04.00 **Seinast sýnaður:** 26.10.05

**Kr. 78.000,-**



**Toyota Camry 3,0 GL Sedan aut.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** ER 235 **Km:** 94.000
**Árgangur:** 12.04.00 **Seinast sýnaður:** 09.11.05

**Kr. 165.000,-**



**Toyota Yaris 1,5T Sport 5D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KH 071 **Km:** 62.000
**Árgangur:** 03.10.01 **Seinast sýnaður:** 03.03.05

**Kr. 105.000,-**



**Toyota Avensis Verso 7. pers aut** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KA 350 **Km:** 61.000
**Árgangur:** 28.08.03 **Seinast sýnaður:** 28.08.03

**Kr. 248.000,-**



**Toyota Avensis 1,8 Terra**

**Skrásetingarnr:** MJ 943 **Km:** 124.000
**Árgangur:** 26.11.98 **Seinast sýnaður:** 27.08.04

**Kr. 82.000,-**



**Toyota Avensis 2,0 D Stw** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RT 792 **Km:** 86.000
**Árgangur:** 17.07.98 **Seinast sýnaður:** 05.11.05

**Kr. 88.000,-**



**Toyota Avensis 1,8 Luna** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BR 614 **Km:** 73.000
**Árgangur:** 20.10.99 **Seinast sýnaður:** 12.12.05

**Kr. 90.000,-**



**Skoda Fabia 1.4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EL 476 **Km:** 79.000
**Árgangur:** 27.06.02 **Seinast sýnaður:** 23.03.06

**Kr. 86.000,-**



**Kia Carens 2.0**

**Skrásetingarnr:** TE 148 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 09.09.03 **Seinast sýnaður:** 09.09.03

**Kr. 128.000,-**



**Toyota Yaris 1,5 Sport 5D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SR 900 **Km:** 59.947
**Árgangur:** 23.08.01 **Seinast sýnaður:**

**Kr. 112.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F



# Oljudálking í Klaksvík

Leygardagin var ein oljuleki úr skipinum Atlantic Navigator, sum lá við bryggju í góðshavnini í Klaksvík, orsøk til eina stóra oljudálking á vágni í Klaksvík.

Bjargingarbáturin Ziska legði oljusperringar um Atlantic Navigator, og saman við øðrum bátum reinsaðu teir vágna í umleið 22 tímar.

Vakthavandi frá Klaksvíkar Havn sigur, at hetta er største oljudálking, sum tey hava upplivað í Klaksvík. Tá teir vóru lidnir at reinsa, høvdu teir fingið 2500 litur av spillolju upp. Í gjáramorgunin vóru teir runt kannaðu eftir, og tað sá út til, at tað hevði eydnast, at reinsa alla oljuna.

Tað var Klaksvíkar Sløkkilið sum stóð fyri reinsingini, og fingu eisini hjálp frá Runavíkar Havn, sum hevur eina serliga pumpu at reinsa olju við.

**ella**



*Ein lastbilur fer her avstað við øðrum av bilunum, sum fóru útav uttanfyr Hvalbiartunnilin fríggjakvøldið*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

# Tveir bilar útav uttan fyri Hvalbiartunnilin

**Fríggjakvøldið fóru tveir bilar útav vegnum uttanfyri Hvalbiartunnilin. Tann fyrri fór útav umleið kl. 18.15 og tann seinni umleið tveir tímar seinni, á júst sama staði**

FERÐSLUÓHAPP
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Hósdagin var ein grein í Sosialinum, har víst var á, at tað eru fleiri trygdarkrøv, sum Hvalbiartunnilin ikki lýkur. Eitt av mongum kritikkpunktum var:

- Ongin vatnrenna er í norðara enda í tunlinum, so í frosti er vegurin sera hálur langt inn í tunnilin, samstundis sum krapt sving er í vegnum beint uttan fyri tunnilin... og tað er til stóran vanda fyri bilar og ferðandi.

Fríggjakvøldið fóru tveir bilar útav vegnum beint uttan fyri Hvalbiartunnilin og hugsast kann, at júst hetta var orsøkin til óhappini.

Av løgreglustøðini í Suðuroy siga tey, at vegurin uttan fyri tunnilin var hampiliga turrur, og at orsøkin allarhelst var, at dekkini á bilunum vóru blivin vát í tunnilinum, og at bilførararnir tí mistu tamarhaldið, tá teir komu í knappa svingið uttanfyri tunnilin.

Eingin persónsskaði hendi av óhappunum, men annar bilurin fór illa, meðan gronin fór á hinum bilinum.